DRYPSTÍTTLEIKI

Æðradropp verða brúkt til at geva sjúklingum vætu og heilivág.

Sjúkrarøktarfrøðingar skulu rokna drypstíttleikan, *D*, í dropum um minuttin í æðradroppinum.

Tey brúka formulin $D = \frac{dn}{60t}$ har

d er dropafaktorurin mátaður í dropum pr. millilitur (ml)

n er nøgdin í ml í æðradroppinum

t er tímatalið, sum æðradroppið skal renna.

Spurningur 1: DRYPSTÍTTLEIKI

PM903Q01 – 0 1 2 9

Ein sjúkrarøktarfrøðingur ætlar at tvífalda tíðina, sum eitt æðradropp skal renna.

Greið gjølla frá, hvussu *D* broytist, um *t* verður **tvífaldað**, men *d* og *n* verða ikki broytt.

.....

.....

.....

Spurningur 3: DRYPSTÍTTLEIKI

PM903Q03 – 0 1 9

Sjúkrarøktarfrøðingar skulu eisini rokna nøgdina av æðradroppinum, *n*, við støði í drypstíttleikanum, *D*.

Eitt æðradropp við einum drypstíttleika upp á 50 dropar um minuttin skal gevast einum sjúklingi í 3 tímar. Til hetta æðradroppið er dropafaktorurin 25 dropar pr. ml.

Hvat verður æðradroppið í nøgd í ml?

Æðradropp í nøgd: ..... ml